**Fuglafjarðar Skúli**
Mirmansvegur 48
FO-530 Fuglafjørður. Føroyar
Tlf. +298 23 80 60. E-mail: fug@skulin.fo

Fuglafjørður 11.01.2017

# Varaskúlastjóri til Fuglafjarðar skúla

**Um starvið**

Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum undir ábyrgd og í samstarv við skúlaleiðararn skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans.
Harafturat skal viðkomandi duga at samstarva, vera hugaður at royna nýggjar leiðir, vera fyrikomandi og fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi og eftir fyriskipan skúlaleiðarans.

Starvssetanin er føst og byrjar 1. august 2107.

**Førleikakrøv**

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgvin og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjari hevur leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálarráðið og Føroya Lærarafelag.

Undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**

Umsóknir við CV, avritum av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. februar kl 15.00. Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Ólav Thomsen, skúlastjóra, á tel. 743082. Eisini ber til at senda teldupost til fug@skulin.fo.

*Fuglafjarðar skúli hevur næsta skúlaár umleið 270 næmingar í 1 .- 10. flokki. Á skúlanum starvast 26 lærarar, 1 skrivstovufólk, 1 húsavørður og 3 námsfrøðiligir stuðlar.*